2018

# ÁRSFRÁSØGN LANDSSJÚKRAHÚSIÐ



Innihaldsyvirlit

1.0 Leiðslufrágreiðing ..... 2
2.0 Nýttar Roknskaparreglur ..... 3
3.0 Játtanarroknskapurin 2018 ..... 5
3.1 Fíggjarstøðan 31.desember 2018 ..... 7
4.0 Ársfrágreiðing 2018 ..... 8
4.1. Viðmerkingar til artkontubólkaroknskapin ..... 9
4.2 Leiðsluátekning ..... 12
5.0 Grannskoðaraátekning frá óheftum grannskoðara ..... 13
**Grannskoðanarátekning á ársroknskapin** ..... 13
**Niðurstøða** ..... 13
**Grundarlag fyri niðurstøðuni** ..... 13
**Áherðsla á viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini** ..... 13
**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum** ..... 13
**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum** ..... 13
6.0 Útgreining av artskontubólkaroknskapinum ..... 16
7.0 Notur til fíggjarstøðuna ..... 20
7.1 Materiel støðisogn ..... 20
7.2 Tænastu-, vøruskuldarar o.t. ..... 20
7.3 Tøkur peningur ..... 21
7.4 Millumrokning ..... 22
7.5 Útjavningarkonta og millumrokning til samans ..... 22
7.6 Skuld til samans ..... 22
7.7 Eventualskyldur ..... 22
8.0 Postar, ið ikki eru við í fíggjarstøðuni ..... 24
8.1 Goymslan ..... 24
8.2 Aðrar skyldur ..... 24
9.0 Tryggingar ..... 25
10.0 Virksemi 2018 ..... 26
10.1 Starvsfólkyvirlit 2018 ..... 27
11.0 Bygnaður Landssjúkrahúsið 2018 ..... 28

## 1.0 Leiðslufrágreiðing

Síðan ár 2009 hevur Landssjúkrahúsið havt eina yvirordnaða trímannaða leiðslu við sjúkrahússtjóra og tveimum varastjórum, ein við læknafakligari bakgrund og ein við sjúkrarøktarfrøðisligari bakgrund. Á Landssjúkrahúsinum eru eisini settar tvímannaðar leiðslur á depilsstøði við leiðandi yvirlækna og leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi. Deplarnir eru: Medisin-, Skurð-, Psykiatri-, Diagnostisk-, Bráð- og Tænastudepil. Sí bygnaðin á síðu 26.

Landssjúkrahúsið arbeiðir eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um Roknskaparverk Landsins o.a.", "Kontuskipan Landsins" og við bókhalds- og roknskaparskipanini "Oracle Financials", sum allar vórðu settar í verk í 1997. Bókhalds- og roknskaparskipanin varð endurnýggjað við ársskiftið 2001/2002. Í november 2013 byrjaði Landssjúkrahúsið at brúka Roknskaparverkgongina (RVG) til at avgreiða fakturar við.

Ein av broytingunum í kunngerðini um roknskaparverk landsins o.a. frá 22. august 1996 er, at ársroknskapirnir fyri almennu stovnarnar eisini skulu fevna um fíggjarstøðu. Hvussu umfatandi hendan fíggjarstøðan skal vera fyri Landssjúkrahúsið, er eitt sindur ógreitt. Fíggjarstøðan er sett upp, so at hendan samsvarar við Búskaparskipan landsins.

Játtanarroknskapurin og fíggjarstøðupostarnir fevna um undirkontu 20, "Vanligt virksemi: Landssjúkrahúsið" og undirkontu 40, "Inntøkufíggjað virksemi: Vaskaríið", meðan artkontubólkaroknskapurin og artkonturoknskapurin bert umfata vanligt virksemi á Landssjúkrahúsinum.

Umframt vanligu játtanina á fíggjarlógini hevur Landssjúkrahúsið saman við hinum báðum sjúkrahúsunum, eina felags játtan til medicoteknisk tól, sum stendur á egnari høvuðskontu og verður umsitin og útlutað av Heilsumálaráðnum. Í 2011 varð serstakur sjúkrahúsheilivágur koyrdur út á eina høvuðskontu fyri seg, sum verður umsitin av eini heilivágsnevnd, og har sjúkrahússtjórin á Landssjúkrahúsinum er formaður. Landssjúkrahúsið hevur seinastu árini arbeitt við at fáa umvælt sjúkrahúsið og hevur í hesum sambandi gjørt eina langtíðarætlan. Til hesa ætlan er ein íløgujáttan til Landssjúkrahúsið, sum verður umsitin av Landsverk, og koyrir hendan játtanin tí eisini uttan fyri vanligu rakstrarjáttanina.

## 2.0 Nýttar Roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri 2018 er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

**Søla**
Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum eru tiknar við í rakstrarroknskapin í tann mun, avhending er farin fram áðrenn árslok. Leiguinntøka verður tó tikin við, tá ið leiguinntøkan er inngoldin – kontantprinsippið.

**Útreiðslur**
Útreiðslur verða rakstrarførdar, tá hesar verða móttiknar og váttaðar sambært váttanarreglunum.

**Materiel støðisogn**
Materiel støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Bygningar verða avskrivaðir yvir 50 ár. Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

**Tænastu-, vøruskuldarar o.t.**
Vøru- og tænastuáogn er upptikin til áljóðandi virði hjá Landssjúkrahúsinum og Vaskarínum. Hendan er saldan á S/R kontu nr. 0321 í "Summary Trial Balance. Period; 16-18". Avseting verður gjørd móti væntandi tapi upp á skuldarar.

**Goymsla**
Eins og undanfarin ár er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukontu í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

**Ognarar**
Ognarnar innganga í upphæddini "Tøknilig millumrokning við landskassan" konta 0360 og ikki sum ein sjálvstøðugur roknskaparpostur í fíggjarstøðuni.

**Avsettar skyldur**
Avsettar skyldur verða tiknar við í roknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint. Nær skyldan ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum er treytað av eftir hvørjum meginreglum, skyldan er tikin við á fíggjarlóg.

## Salda primo

Salda primo í fíggjarstøðuni er SR konta nr. 0510 í "Summary Trial Balance. Period; 16-18".

## Millumrokning

Millumrokning er netto salda av "Summary Trial Balance. Period; 16-18", S/R kontur nr. 0360, 0532, 0814 umframt 0819.

# 3.0 Játtanarroknskapurin 2018

Føroya Løgting samtykti í 2018, at Landssjúkrahúsið skuldi hava eina nettorakstrarjáttan upp á 457.524 tkr. umframt eina rakstrarframskriving av lønum, sum var veitt við eini eykajáttan upp á 16,4 og eykajáttan aftrat áljóðandi 10. tkr. Til samans er játtanin frá Føroya Løgtingi til Landssjúkrahúsið 681.525 tkr. fyri 2018. Samansetingin av játtanarroknskapinum er víst í talvuni niðanfyri útgreinað á undirkontirnar, sum eru uppbýttar í vanliga virksemi og virksemi uttanlands.

| | | |
|---|---|---|
| Fíggjarlógin 2018 | kr. | 457.524.000 |
| Eykajáttan 2018 | kr. | 26.495.000 |
| **Til samans** | **kr.** | **484.019.000** |
| Útreiðslur 2018, Landsjúkrahúsið | kr. | 527.399.941 |
| Útreiðslur 2018, Vaskaríið | kr. | 13.840.153 |
| Inntøkur 2018, Landssjúkrahúsið | kr. | 33.530.666 |
| Inntøkur 2018, Vaskaríið | kr. | 13.910.602 |
| **Úrslit 2018** | **kr.** | **-9.779.826** |

Landssjúkrahúsið hevði til samans eina meirnýtslu á 9.780 tkr. í 2018 ella eitt nettoúrslit, ið vísir eitt hall á 1,85%. Hendan meirnýtsla stavar m.a. frá, at ein munandi aktivitetsøking hevur verið á uml. 9% í 2018 í mun til 2017. Hetta hevur í stóran mun ávirka nógv økir á LS, m.a. innan diagnostiska øki, innanhýsis heilivágs kontoina, goymsluna umframt serlækna konsulent virksemi.

Játtanarroknskapurin er okkara uttanhýsis roknskapur og er uppsettur samsvarandi sundurgreiningini á løgtingsfíggjarlógini undir § 11 Heilsumál.

Í tí dagligu stýringini verður hesin roknskapur ikki einans nýttur. Til vanliga virksemi verður ein innanhýsis Artroknskap, ið er sundurgreinaður í artkontur, ið eru tillagaðar virkseminum í sjúkrahúsverkinum.

Frávik millum játtanarroknskap og fíggjarjáttanina 2018 eru víst á næstu síðu fyri hvørja undirkonto sær.

| í kr | | Játtan 2018 | Eykajáttan 2018 | Játtan til samans 2018 | Roknakapur 2018 | Avlop/hall 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan til samans** | | **457.524.000** | **26.495.000** | **484.019.000** | **493.798.825** | **-9.779.825** |
| Útreiðslur til samans | | 496.124.000 | 26.495.000 | 522.619.000 | 541.243.993 | -18.624.993 |
| Inntøkur til samans | | -38.600.000 | 0 | -38.600.000 | -47.445.168 | 8.845.168 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | | **483.724.000** | **26.495.000** | **510.219.000** | **527.403.840** | **-17.184.840** |
| 11 | Lønir | 365.349.000 | 26.495.000 | 391.844.000 | 371.229.988 | 20.614.012 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 111.320.000 | 0 | 111.320.000 | 150.145.958 | -38.825.958 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 6.705.000 | 0 | 6.705.000 | 2.224.727 | 4.480.273 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 100.000 | 0 | 100.000 | 2.719.244 | -2.619.244 |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 0 | 0 | 0 | 302.738 | -302.738 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 250.000 | 0 | 250.000 | 454.870 | -204.870 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | 0 | 2.498 | -2.498 |
| 71 | Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar | 0 | 0 | 0 | 323.817 | -323.817 |
| **Inntøkur** | | **-26.200.000** | **0** | **-26.200.000** | **-33.534.566** | **7.334.566** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -26.000.000 | 0 | -26.000.000 | -29.605.559 | 3.605.559 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | -200.000 | 0 | -200.000 | -1.102.918 | 902.918 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 0 | 0 | 0 | -3.900 | 3.900 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -450.000 | 450.000 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | 0 | 0 | 0 | -2.372.189 | 2.372.189 |
| **Netto úrslit** | | **457.524.000** | **26.495.000** | **484.019.000** | **493.869.274** | **-9.850.274** |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi: Vaskaríið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | | **12.400.000** | **0** | **12.400.000** | **13.840.153** | **-1.440.153** |
| 11 | Lønir | 5.700.000 | 0 | 5.700.000 | 6.504.313 | -804.313 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 3.500.000 | 0 | 3.500.000 | 3.967.359 | -467.359 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 500.000 | 0 | 500.000 | 638.642 | -138.642 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.700.000 | 0 | 2.700.000 | 2.459.479 | 240.521 |
| 32 | Útvegan av løgu o.ø. | 0 | 0 | 0 | 270.360 | -270.360 |
| **Inntøkur** | | **-12.400.000** | **0** | **-12.400.000** | **-13.910.602** | **1.510.602** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -12.400.000 | 0 | -12.400.000 | -13.910.602 | 1.510.602 |
| **Netto úrslit** | | **0** | **0** | **0** | **-70.449** | **70.449** |

## 3.1 Fíggjarstøðan 31.desember 2018

| OGN | nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| **Støðisogn** | | | |
| Bygningar, løgur o.t. | | 19.382.400 | 19.382.400 |
| Bygningar | | 487.553.245 | 487.553.245 |
| Innbúgv og annar útbúnaður | | 25.473.534 | 25.473.534 |
| Samantaldar avskrivingar - bygningar o.t | | -197.512.264 | -188.073.551 |
| Samantaldar avskrivingar - útbúnaður o.t. | | -18.985.095 | -16.472.629 |
| | | | |
| **Materiell Støðisogn tilsamans** | 7.1 | **315.911.820** | **327.862.999** |
| | | | |
| **Ogn í umferð** | | | |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t., landskassadømi | 7.2 | 4.157.506 | 7.756.247 |
| Avsetan móti tapi | | -404.840 | -132.735 |
| Banka- og girokonti SHD | 7.3 | 78.412 | 162.123 |
| Forskotskassar | 7.3 | 59.875 | 77.081 |
| Onnur áogn | | 1.489.054 | 1.228.510 |
| Tíðaravmarkingar | | -101.609 | -48.623 |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **5.278.398** | **9.042.603** |
| | | | |
| **OGN TIL SAMANS** | | **321.190.218** | **336.905.603** |
| | | | |
| **SKYLDUR** | | | |
| **Útjavningarkonta og millumrokning** | | | |
| Salda pimo | | -6.999.587.994 | -6.529.514.995 |
| Millumrokning | 7.4 | 7.807.400.761 | 7.327.768.906 |
| Úrslit áðrenn játtan | | -493.798.825 | -470.072.999 |
| | | | |
| **Útjanvingarkonta og millumrokning til samans** | 7.5 | **314.013.942** | **328.180.911** |
| | | | |
| **Skuld** | | | |
| Ikki inntøkuført, granskingarinntøkur og gávur | | 935.360 | 0 |
| Onnur skuld | | 6.240.916 | 8.724.691 |
| | | | |
| **Skuld til samans** | 7.6 | **7.176.276** | **8.724.691** |
| | | | |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | **321.190.218** | **336.905.603** |
| | | | |
| Eventualskyldur | 7.7 | | |

## 4.0 Ársfrágreiðing 2018

Í ársfrágreiðingini viðgera vit fíggjarligar ognir og skuld hjá Landssjúkrahúsinum. Haraftúrat verða viðmerkingar gjørdar til einstøku kontubólkarnar í rakstrarroknskapinum og til kontubólkarnar í fíggjarstøðuni.

Innanhýsis roknskapurin, "Artkontubólkaroknskapurin", er settur upp í høvuðskontubólkar niðanfyri. Frágreiðing um frávikini í Artkontubólkaroknskapinum er frá síðu 9 til 11.

Artkontubólkaroknskapurin er vístur niðanfyri:

| Art-bólkur | Kontobólkur | Ætlan 2018 | Eykajáttan 2018 | Ætlan +EYÆ 2018 | Roknskapur 2018 | Avlop/hall 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Egnar inntøkur** | | | | | |
| **11** | Inntøkur | -27.750.000 | 0 | -27.750.000 | -31.616.459 | 3.866.459 |
| **13** | Endurgjøld | 0 | 0 | 0 | -26.401.086 | 26.401.086 |
| | **Egnar inntøkur tilsamans** | **-27.750.000** | **0** | **-27.750.000** | **-58.017.545** | **30.267.545** |
| | **Rakstrarútreiðslur** | | | | | |
| **25** | Lønir | 349.867.195 | 26.495.000 | 376.362.195 | 396.877.276 | -20.515.081 |
| **31** | Vørur til sjúkraviðgerð og røkt | 52.841.649 | 0 | 52.841.649 | 58.519.541 | -5.677.892 |
| **32** | Kostarhald | 7.740.000 | 0 | 7.740.000 | 6.427.820 | 1.312.180 |
| **34** | Reinhald og vask | 688.000 | 0 | 688.000 | 972.893 | -284.893 |
| **36** | Skrivstovuhald | 2.670.000 | 0 | 2.670.000 | 3.915.813 | -1.245.813 |
| **37** | Bøkur og tíðarrit v.m. | 528.000 | 0 | 528.000 | 937.705 | -409.705 |
| **38** | Keyp av orku | 10.150.000 | 0 | 10.150.000 | 8.903.513 | 1.246.487 |
| **41** | Teknisk vørunýtsla | 100.000 | 0 | 100.000 | 143.576 | -43.576 |
| **42** | Bygningar og grundøki | 800.000 | 0 | 800.000 | 2.370.920 | -1.570.920 |
| **43** | Tekniskar innleggingar | 4.234.156 | 0 | 4.234.156 | 5.523.260 | -1.289.104 |
| **44** | Innbúgv | 1.844.000 | 0 | 1.844.000 | 3.076.481 | -1.232.481 |
| **45** | Medicoteknikkur | 5.480.000 | 0 | 5.480.000 | 5.484.979 | -4.979 |
| **46** | Amboð og rakstrargøgn | 1.930.000 | 0 | 1.930.000 | 1.929.640 | 360 |
| **47** | EDV- og skrivstovutól | 5.250.000 | 0 | 5.250.000 | 7.144.200 | -1.894.200 |
| **51** | Ferða og flutningsútreiðslur | 10.762.000 | 0 | 10.762.000 | 7.889.171 | 2.872.829 |
| **52** | Keyp av sakkønari tænastu | 27.389.000 | 0 | 27.389.000 | 39.302.825 | -11.913.825 |
| **53** | Tryggingar | 630.000 | 0 | 630.000 | 647.769 | -17.769 |
| **54** | Socialar veitingar | 460.000 | 0 | 460.000 | 417.745 | 42.255 |
| **61** | Umboðan | 160.000 | 0 | 160.000 | 415.563 | -255.563 |
| **62** | Aðrar útreiðslur | 0 | 0 | 0 | 333.992 | -333.992 |
| **69** | Skattur og avgjøld | 1.750.000 | 0 | 1.750.000 | 2.094.897 | -344.897 |
| **00-09** | Ógreinað. | 0 | 0 | 0 | -1.442.759 | 1.442.759 |
| | **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **485.274.000** | **26.495.000** | **511.769.000** | **551.886.820** | **-40.117.820** |
| | **Netto úrslit** | **457.524.000** | **26.495.000** | **484.019.000** | **493.869.275** | **-9.850.275** |

Sum sæst, vísir artroknskapurin hjá Landssjúkrahúsinum í 2018 eina samlaða nettoútreiðslu upp á 493.869 tkr.

Nettorakstrarútreiðslurnar eru 9.850 tkr. hægri enn játtanin upp á 484.019 tkr. Munurin millum samlaða játtanarroknskapin og artkonturoknskapin er, at Vaskaríið, sum er inntøkufíggjað virksemi, ikki er við í artkonturoknskapinum.

Verður hugt at talvuni niðanfyri sæst, hvussu játtanar- og standardroknskapurin hongur saman við artkonturoknskapinum.

| | Roknskapur 2018 í tkr. |
|---|---|
| Nettoútreiðslur 2018, Landssjúkrahúsið, artskonta | 493.869 |
| Inntøkufíggjað virksemi, Vaskaríið | -70 |
| Landskassastuðul íroknað inntøkufíggjað virksemi | 493.799 |
| Netto meirnýtsla | -9.780 |
| Netto játtan til samans, íroknað inntøkufíggjað | 484.019 |

### 4.1. Viðmerkingar til artkontubólkaroknskapin

Niðanfyri eru viðmerkingar til teir kontubólkar, har munandi frávik vóru ímillum ætlan og roknskap. Útgreining av artkontubólkaroknskapinum er at finna frá síðu 15 til 18.

Konta 11 – "Inntøkur" vísir eina meir inntøku upp á 3.866 tkr., sum í høvuðsheitum stavar frá sølu úr goymsluni, sølubúðini og húsaleigu. Viðvíkjandi sølu hjá sølubúðini verða inntøkurnar javnaðar við tær lønarútreiðslur, sum Landssjúkrahúsið hevur av sølubúðini.

Konta 13 – "Endurgjøld" vísir eina meirinntøku á 26.401 tkr. Í 2018 eru 26.401 tkr. endurgoldnar. Hetta er endurgjald frá lønarkoyring fyri onnur, endurgjald frá barnsburðargrunninum, frá vardum størvum og peningur úr serlæknapuljuni sum er útreiðsluført á artkontubólki 25, lønir. Harumframt eru endurgjøldini eisini flytingar frá viðgerð uttanlands til LS, vegna viðgerðir gjørdar á Landssjúkrahúsinum, ið annars høvdu verið gjørdar uttanlands.

Konta 25 – "Lønir til samans" vísir eina meirnýtslu upp á 20.515 tkr. í artroknskapinum. Men tá hædd verður tikin fyri "Endurgjaldi" fyri lønir á 26.401 tkr. undir bólki 13, er talan um eina minninýtslu upp á 5.886 tkr. Minninýtslan stavar frá nógvum sparingum, eins og at deild hevur verið stongd ávís tíðarskeið. Í ávísum førum hevur ikki verið møguleiki at fáa serlæknar í fast starv á Landssjúkrahúsinum, og hava vit tí verið noydd at keypa tænastuna frá øðrum sjúkrahúsum og serlæknum annars. Hetta hevur tí viðført meirútreiðslur á rakstrarkontum fyri konsulentar.

Konta 31 – "Vørur til sjúkraviðgerð og røkt" eru brúktar 5.678 tkr. meir enn mett. Hendan meirnýtsla stavar serstakliga frá øktum virksemi.

Konta 32 – "Kostarhald" hevði eina minninýtslu upp á 1.312 tkr., ið stendst sparingum settar í verk fyri at tálma matútreiðslunum á Landssjúkrahúsinum.

Konta 34 – "Reinhald og vask" hevði eina meirnýtslu upp á 285 tkr.

Konta 36 – "Skrivstovuhald" hevði eina meirnýtslu upp á 1.246 tkr., og stavar hendan í høvuðsheitinum frá nútímamnsgering av øðrum skrivstovuútbúnaði, m.a. til nýggjar serlæknar.

Konta 37 – "Bøkur og tíðarrit v.m." vísir eina meirnýtslu upp á 409 tkr. Sølubúðin hevur keypt avísir og onnur tíðarrit, sum vísa seg sum inntøkur undir artbólki 11.

Konta 38 – "Keyp av orku" hevði eina minninýtslu upp á 1.246 tkr. Her er tað serstakliga serliga inntøkurnar frá øktum orkunýtslu á vaskaríinum sum gera tað at har er ein minninýtsla. Orkukeypi og prísurin hevur annars verið hægri enn væntað í 2018.

Konta 41 – "Teknisk vørunýtsla" hevði eina meirnýtslu upp á 44 tkr.

Konta 42 – "Bygningar og grundøki" hevði eina meirnýtslu í mun til ætlanina upp á 1.571 tkr. Serliga vegna útskiftan av gomlum vindeygum.

Konta 43 - "Tekniskar innleggingar" hevði eina meirnýtslu upp á 1.289 tkr. Hendan meirnýtslan stavar vegna viðlíkahald og nútímansgerð av gomlum tekniskum rakstrargøgnum.

Konta 44 – "Innbúgv" hevði eina meirnýtslu upp á 1.232 tkr. Hetta kemur av meirkeyp av m.a. hospitalssengrum

Konta 45 – "Medicoteknisk tól" hevði eina meirnýtslu upp á 5 tkr.

Konta 46 – "Amboð og rakstrargøgn" vísir eina minninýtslu upp á 0,4 tkr.

Konta 47 – "EDV- og skrivstovutól" vísir eina meirnýtslu upp á 1.894 tkr. LS er sera tengt av KT og tørvurin á at ajourføra øki er stórt.

Konta 51 – "Ferða- og flutningsútreiðslur" hevði eina minninýtslu upp á 2.873 tkr.

Konta 52 – "Keyp av sakkønari tænastu" hevði eina meirnýtslu upp á 11.914 tkr. Hetta kemst serstakliga av keyp av konsulentum innan diagsnostiska depilin og skurðdepilin, vegna serlækna mangul. Øktar útreiðslur eru eisini innan onkologiska økið og føðiøkið.

Konta 53 – "Tryggingar" hevði eina meirnýtslu upp á 18 tkr.

Konta 54 – "Sosialar veitingar" hevði eina minninýtslu upp á 42 tkr.

Konta 61 – "Umboðan". Hendan útreiðslukonta hevði eina meirnýtslu upp á 256 tkr.

Konta 62 – "Aðrar útreiðslur" hevði eina meirnýtslu upp á 334 tkr.

Konta 69 – "Skattur og avgjøld" hevði eina meirnýtslu upp á 345 tkr. Meirnýtslan stavar frá øktum flutnings- og farmagjøldum.

Konta 00 – "Opnir postar" hevði eina upphædd upp á 1.443 tkr. Hendan upphædd m.a. stavar frá tíðaramarkan av lønum í 2018. Tíðaravmarkanin er skrásett av Gjaldstovuni uttan artskonto.

## 4.2 Leiðsluátekning

Ársroknskapurin hjá Landssjúkrahúsinum er eftir okkara meting greiddur úr hondum samsvarandi galdandi roknskaparreglum. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi. Ógreitt er, hvussu skyldugar starvsfólkaskyldur skulu viðgerast roknskaparliga sambært "Kunngerð nr. 22. frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Mettu starvsfólkaskyldurnar eru gjørdar upp til 22 mió.kr., sum eru vístar í notu 8.2 í roknskapinum.

Síðan roknskaparárslok er einki hent, sum í týðandi mun hevur ávirkan á ársfrásøgnina.

Tórshavn hin 11.07.2019

Margit Stórá
Virkandi sjúkrahússtjóri

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend av leiðsluni á Landssjúkrahúsinum

hin 11.07.2019

| | |
|---|---|
| Margit Stórá<br>Virkandi sjúkrahússtjóri | Thomas Schiøler<br>Varastjóri |

## 5.0 Grannskoðaraátekning frá óheftum grannskoðara

### *Til løgtingsgrannskoðararnar*

### Grannskoðanarátekning á ársroknskapin

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Landssjúkrahúsinum, frá síðu 3 til 25, fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2018 við rakstrarroknskapi.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í tráð við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við givna játtan og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum og eisini "Kunngerð nr. 125 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" og góðum almennum grannskoðanarsiði. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av stovninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum krøvum og reglum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Áherðsla á viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini**
Vit skulu gera vart við, at játtanartølini ikki eru fevnd av okkara grannskoðan.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt stovnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka stovnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**
Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðaraátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum

## Grannskoðaraátekning frá óheftum grannskoðara

eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparabrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera roknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt stovnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðaraátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at stovnurin ikki er førur fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon

er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 11.07 2019

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# 6.0 Útgreining av artskontubólkaroknskapinum

| Kontonr. | Kontonavn | Ætlan 2018 | Eykaætlan | Roknskapur 2018 | Avlop/hall 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **11.Inntøkur** | | | | |
| 1100 | Inntøkur | 0 | 0 | -1549 | 1.549 |
| 1105 | Søla av vørum | -22.000.000 | 0 | -25.188.698 | 3.188.698 |
| 1110 | Søla av tænastum | -1.450.000 | 0 | -1.688.967 | 238.967 |
| 1115 | Røktarsjúklingar | 0 | | 0 | |
| 1120 | Leiga av húsum, íbúðum og verilsum | -3.200.000 | 0 | -2.657.783 | -542.217 |
| 1125 | Leiga av hølum og økjum | -1.100.000 | 0 | -986.775 | -113.225 |
| 1130 | Telefoninntøkur | 0 | 0 | -1.680 | 1.680 |
| 1135 | Ljósprent, postgjøld v.m. | 0 | 0 | 12.773 | -12.773 |
| 1140 | Aðrar inntøkur | 0 | 0 | -1.103.780 | 1.103.780 |
| | **Inntøkur til samans** | **-27.750.000** | **0** | **-31.616.459** | **3.866.459** |
| | **13.Endurgjøld** | | | | |
| 1305 | EndurgjAld lønir | 0 | 0 | -26.401.086 | 26.401.086 |
| 1320 | Endurgjald Sjúkrahússtjórafyrisætið | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **Endurgjøld til samans** | **0** | **0** | **-26.401.086** | **26.401.086** |
| | **25.Lønir** | | | | |
| 2505 | Grundløn | 349.867.195 | 26.495.000 | 252.791.720 | 123.570.475 |
| 2510 | Funktiónsviðbøtur | 0 | 0 | 7.435.367 | -7.435.367 |
| 2515 | Avspákingarbarar viðbøtur | 0 | 0 | 1.946.658 | -1.946.658 |
| 2520 | Ikki avspákingarbarar viðbøtur | 0 | 0 | 18.434.448 | -18.434.448 |
| 2525 | Samsýning | 0 | 0 | 13.218.337 | -13.218.337 |
| 2530 | Vanligir tímar | 0 | 0 | 22.577.173 | -22.577.173 |
| 2535 | Yvirtímar | 0 | 0 | 10.148.597 | -10.148.597 |
